# TILTØK

SAMBAND
SIGRID TRÓNDARSON
SIGRID@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

**Gudstænastur 18. sunnudag e. trin.**
***Vesturkirkjan:*** kl. 11, konfirmatión, Heri Joensen
***Havnar kirkja:*** kl. 11 Bjarni Bæk, konfirmatión
***Argir:*** kl.11 altarg. Hanus Simonsen
***Nólsoy:*** kl. 12 Kristine S. Hestbech
***Kaldbak:*** kl. 12 Sonja Klein
***Miðvágur:*** kl. 11 konfirmatión David Johannesen
***Hvalvík:*** kl. 12, altargongd, Inga Poulsen Dam
***Norðskála:*** kl. 12 messa Emil Olsen
***Saksun:*** kl. 11, Marjun Bæk.
***Broytt kirkjutíð:*** Í Kollafirði og í Haldórsvík verður nú farið í kirkju kl. 12
***Sjóvar kirkja:*** kl. 12 (barnakórið) Jógvan Fríðriksson
***Rituvík:*** kl. 11, konfirmatión, Meinhard Bjartalíð
***Gøta:*** kl. 11, altarg., Martin R. Jacobsen. ***Í Nes prestagjaldi gongur talvan fyri sunnudagsskúlarnar hjá Heimamissiónini***
***Leirvík:*** kl.12, Uni Næs
***Funningsfjørður:*** kl. 16, Uni Næs
***Hellurnar:*** kl.18, Uni Næs
***Í Fuglafjarðar prestagjaldi gongur talvan fyri Bláa Kross.***
***Broytt kirkjutíð:*** Frá komandi sunnudegi verður farið í kirkju kl. 12 í Fuglafjarðar prestagjaldi.
***Christianskirkjan:*** kl. 11, Niels Pauli Danielsen, konfirmatión. ***Talvan gongur fyri Guðs orðs boðan***
***Kunoy:*** kl. 12, Magnus Brahé Jørgensen, altarg.
***Viðareiði:*** kl. ***12***, Elsa Funding. ***Talvan gongur fyri Sunnudagsskúlan hjá Heimamissiónini***
***Sandur:*** kl. 12 Jákup R. Hansen
***Tvøroyri:*** kl. 11, konfirmatión, Jónsvein Bech

**Aftankvirra í Havnar Kirkju**
verður fríggjakvøldið 5. oktober kl. 21 – 23.
Kl. 22 syngja Sigrid og Annika við fylgispæli.
Kl. 22.30 Andakt.

**Hebron, Argir**
Sunnudagin 7. oktober
Kl. 10.30: Morgunmøti og samstundis barnaansing.
Kl. 11.30: Samvera við drekka.
Kl. 12.00: Sunnudagsskúli og møti. Evni: Christmas Child.
Sunnudagsskúlin er hvønn sunnudag kl. 12.00.
Øll børn eru hjartaliga vælkomin.
Hjartaliga vælkomin í Hebron!

**Kirkju og missiónshúsið á Argjum**
Mánakvøldið 8. oktober kl. 20 Kvinnumøti við Sólbjørg Símunarson. Evnið: »Frá Islam til kristindóm«.

**International Fellowship**
verður í Meinigheitshúsinum í Havn (beint við SMS) leygardagin 6. oktober frá kl. 15. Allir tilflytarar og útlendingar eru vælkomnir.

**Missiónshúsið v/ Landavegin**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli á Norðasta Horni, kl. 18 Møti v/ Andras Biskupsstøð.

**Sjómanskvinnuringurin í Havn**
kemur saman á Sjómansheiminum mánadagin kl. 19.30.
Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Samkoman við Marknagil**
*Skúlaheimið, Marknagilsv.75*
Møti: sunnudagin kl. 10.30 Breyðbróting.
Sunnudagsskúli kl. 12.00
Sunnukvøldið kl. 18.00 Evangeliskt møti.
Mánakvøldið kl. 20.00 Bønar/uppbyggingarmøti.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Leygarkvøldið kl. 21 Flare Extended.
Sunnudagin einki møti vegna Heyststevnu.
www.filadelfia.fo

**Frá Kirkju- og missiónshúsinum á Argjum**
Fríggjadagin kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 11 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Kajberg Davidsen, Skáli.
Øll hjartaliga vælkomin.

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 10 bibliugransking og barnabíbliutími.
Kl. 11 gudstænasta, J.V. Danielsen.

**Frá Meinigheitshúsinum í Havn**
Leygardagin kl. 10 - 15 skeið v. Frank Kristensen frá KFS, evni: Kristin í gerandisdegnum.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli.
Sunnudagin kl. 18 Møti v. Frank Kristensen frá KFS, Hjørdis og Mirian syngja.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Lívdin í Hoyvíkar skúla**
Fríggjakvøldið kl. 21 verður ungdómsmøti, vitnisburður og solo sangur.
Sunnumorgunin kl. 10.30 familjumøti.
kl. 11.30 Samfelagsløta
kl. 12 Tilbiðjunarmøti har Poul Guttesen talar.
Barnaansing undir báðum møtinum.
Kl. 12 Sunnudagsskúlin
Týskvøldið kl. 20, ***á Brekku 3***, Jógvan greiður frá túrinum í Kina.
www.livdin.fo

**Katólska Kirkjan**
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ Wolf Scmidt, prestur í Mariukirkjuni. Aftaná verður kirkjukaffi.
Kl. 14 Sunudagsskúli.
www.katolsk.fo

**KFUM og KFUK í Havn**
Týsdagin kl. 17 í KFUK: Várgleði fyri børn.
Mikudagin kl. 19 í KFUM: Tensingkórið venur.
Hósdagin kl. 15 í KFUK: Seinnapartssamkoman, Mourits Mikkelsen vísir film frá túri í Sandoynni í summar.

**Fríkirkjan Oasan, Kirkjustræti 4**
Sunnudagin kl. 11 Guðstænasta v/Magnus Simonsen, kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/Frelsunarherinum.
Mánadagin kl. 17.15-18 venur barnakórið kl. 20 bønarmøti.
Verið hjartaliga vælkomin.
www.oasan.fo

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Fríggjakvøldið kl. 19 MiniSalt, kl. 21 ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 11 familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, kl 18 missiónsmøti við Mary Lyngvej og Rebekku Nilsen.
http://www.gospel.fo

**Ebenezer**
Sunnudag kl. 11.00 Minnismáltíð Harrans
kl. 12.00 Sunnudagsskúli
kl. 18.00 Evangeliskt møti
Mánadag kl. 12.30 Andakt
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Frelsunarherurin Tórshavn**
Sunnudag kl. 11 fundur har Heimaforbundssystrarnar luttaka við sangi og vitnisburði, drekkamunnur aftaná.
Sunnudagsskúli kl. 14,00.
Einki møti um kvøldið, men vit luttaka á Oasini í Hoyvík kl. 18,00.
suppa,sápa og frelsa síðan 1865
www.frelsunarherurin.fo

**Tórshavnar hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangeliskt møti.
Øll eru vælkomin.

**Filadelfia, Miðvágur.**
Sunnudagin einki møti og eingin sunnudagsskúli.
Mikukvøldið kl. 20 bønarmøti

**Missiónshúsið í Sørvági**
Sunnudagsskúli verður sunnudagin kl. 14.
Onki møti sunnkvøldið vegna konfirmatión.

**Saron, Flatnavegur 7, Vestmanna**
Morgunmøti við breyðbróting sunnudagin 7/10 klokkan 11.
Ver hjartaliga vælkomin.

**Kollafjarðar Missiónshús**
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli og møti kl. 18. Á møtinum verður innsamling til húsið.
Bíbiltími verður týskvøldið kl. 20.00
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Haldórsvík**
Møti verður sunnukvøldið kl. 18 í Avhaldshúsinum. Luttøka úr Meinigheitshúsinum í Havn. Øll eru vælkomin.

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Fríggjadag 5. oktober kl. 21 Ungdómsmøti v/Derhard Olsen.
Sunnudag kl. 17 Sunnudagsskúli og kl. 17 Møti v/ Regin Høgnessen, Leirvík.
Innsamling til arbeiði.
Hugnaløta við drekkamunni aftaná møti.
Mikudag 10. oktober kl. 20 Bíbiltími v/Jógvan Fríðriksson.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Berøa Saltangará**
Sunnudagin kl. 11.30 Breyðbróting og sunnudagsskúli.
Á møtinum kl. 18 talar Jens Olsen Evni. Ílatin kærleika.
Mikukvøldið bønarmøti kl. 19.30.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21, Awake við Kate, Sólrun, Mariu og Maritu.
Sunnudagin kl. 17, Møti við Alice, Øyvind, Birgit og John.
Barnamøti kl. 17. Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

**Meinigheitshúsið á Skála**
Sunnudagin 7-10-07 kl. 13.30 er sunnudagsskúli og kl 19.00 møti við Boga Olsen.
Innsamling til húsið.
Aftaná verður drekka og hugnalig samvera.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Sunnudagin kl. 18 Møti.
Øll hjartaliga vælkomin.

**Aglowdagur verður í Kelduni**
í Skálafirði 6. okt. byrjað verður kl. 10.00
Talari Jytte Nielsen, Sweits
Evni: Andalig og kenslulig misnýtsla, tilmelding á tlf. 217825 v/Rannvá Royðutoft kostnaður 200,-
Allar kvinnur vælkomnar.

**Sjómanskvinnuringurin í Runavík**
kemur saman í Kvinnufelagshúsinum mánakvøldið kl. 19.30. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Thabor, Fuglafjørður**
Sunnudagsskúlin er í kirkjutíð kl. 11 í kirkjukjallarinum.
Møti verður sunnukvøldið kl. 18, har Frants Jensen talar.
Innsavnan til Thabor. Eftir møti er felags nátturði.

**Missiónshúsið í Leirvík**
Sunnudagin kl. 14.30 sunnudagsskúli, kl. 18 sang- og offurkvøld. Aftaná verður drekka. Kl. 21 verður ungdómsmøti við Dánjal Andreasen.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**KFUM & K, Klaksvík**
Fríggjakvøldið, 5. okt
kl. 22 - Opið Hús.
Sunnudagin kl. 14 - sunnudagsskúli, kl. 18 - Møti,
kl. 21 - Ungdómsmøti.

**Soli Deo Gloria**
Sunnukvøldið kl. 18 møti.
Mánakvøld kl. 20 bønarmøti.

**Getsemane, á Brekku 19**
Ungdómsmøti fríggjadagin er avlýst vegna legu.
Møti og sunnudagsskúlin sunnudagin er avlýst vegna legu.
Hvønn gerandismorgun kl. 6.15 er morgunbøn.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli. Kl. 17.30 bøn- & lovsangur, kl. 18 møti.
Ungdómstiltøk verða í døgunum 12.-13. okt. við ungdómi úr Oasuni. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Eingin sunnudagsskúli og einki møti verður sunnudagin vegna konfirmatión.

**Missiónshúsið í Vági**
Sunnukvøldið onki møti vegna sjónvarpsmøti í Porkeri kl. 15.

**Frelsunarherurin Vágur**
Fríggjadagin 5/10-07 eftir konsertina í Vágs kirkju, verður Cafekvøld við Heina, Magna og øðrum sangkreftum í hølunum hjá frelsunarherinum, har øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Porkeri**
Leygarkvøldið 6. okt kl. 21 verður ungdómsmøti í missiónshúsinum í Porkeri við Jógvan Højgaard trúboðara.
Øll eru hjartaliga vælkomin!

**Betania, Sumba**
Møti verður sunnukvøldið kl. 20. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Ørkin, Reykjavík**
Møtini vera hvønn sunnudag kl. 17.00 á Ørkini!
***Vikuskiftið 5 - 7 okt.*** er vitjan frá Toftum í Føroyum. Olaf Magnussen og fleiri luttaka.
Leygadagin 6. okt. kl. 20 er hugnakvøld við søgum, skemti og sangi.
Sunnudagin kl. 17 er møti við sangi og vitnisburði og Olaf Magnussen talar.
Drekkamuður og prát aftaná møti.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Felagið Tórshavn, gongutúrur**
Sunnudagin 7. oktober kl. 10 fer Felagið Tórshavn ein gongutúr til Risans Hellu í Hósvík. Lættur túrur, eisini vælegnaður til børn.
Minst til at hava góð og heit gonguklæði og matpakka við. Tilmelding á Kunningarstovuni tlf. 302425 ella á torsinfo@torshavn.fo

**Tilhaldið í Tórsgøtu 21**
*tlf. 316491 · fax 316481*
*Opið er mánadag-fríggjadag kl. 10.00-17.00*
*Teldupostur: tilhald@torshavn.fo*
*Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks*
***Mánadagur 8. okt.***
10.00 - Fimleikur v / Grete Ellingsgaard
10.00 - 12.00
10.00 - 12.00 Ymiskt handarbeiði v/ Signy og Maritu
14.00 - 16.00 Ymiskt handarbeiði v/ Signy og Maritu
11.00 - Enskt talumál
14.00 - Kortspæl og onnur spøl
***Týsdagur 9. okt.***
09.00 - 12.00 Telduskeið v/ Páll Poulsen
10.00 - 11.30 Sangløta v/ Hanus Joensen
15.00 Málprát v/ Jóhan H. W. Poulsen
***Mikudagur 10. okt.***
09.00 - 12.00 Maskinbinding v/Maritu Guttesen
Tilmelding: 316491 byrjar mikudagin 24. okt.
10.00 - 12.00 Veving v/ Joanu Bjarnastein
Tilmelding: 316491 byrjar mikudagin 24. okt.
10.00 - 12.00 Bindiklubbur
Øll eru hjartaliga vælkomin
10.00 - 13.30 Matgerð v/ Sigrid Dalsgaard
12.00 Døgurði
15.00 - Túrur við ella uttan stavar.
Úr Tilhaldinum, Viðalundina, Óðinshædd og Stoffalág
Randi/Elisabeth, fysioterapeutar
***Hósdagur 11. okt.***
10.00 - Fimleikur v / Grete Ellingsgaard
10.30 - Lesibólkurin hittist aftur 25. okt. Bókin: »En mand kom til byen«, Ide Jessen verður lisin
***Fríggjadagur 12. okt.***
10.00 - 13.30 Matgerð v/Anne Grethe Harlou fríggjadag er avlýst fyribils
10.00 - 17.00 Opið hús

**Dagtilhaldið Blákollan á Oyri**
Dagtilhaldið Blákollan á Oyri og er fyri allar eldri í Sunda Kommunu. Opið er hvønn týsdag og hósdag frá kl. 14.00 til 18.00.
Ymiskt ítriv, smíð og teldufrálæra v.m.

**Dagtilhaldið í Luffustovu**
Øll eldri eru hjartaliga vælkomin.

**Dagtilhaldið Fløvi á Glyvrum**
Í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum tlf. 448279.
Opið hvønn gerandisdag frá kl. 15-18. Um tygum mangla bil, vinarliga ring 266217.
Allir pensionistar eru hjartaliga vælkomnir.
***Mánadagin 8. okt.***
Opið hús
***Týsdagin 9. okt.***
Fimleikur og felagssangur
***Mikudagin 10. okt.***
Opið hús
***Hósdagin 11. okt.***
Myndaveving v/ Gretu Olsen.
***Fríggjadagin 12. okt.***
Boccia.
Hvønn dag er ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks, somuleiðis kort og spøl. Ver vælkomin at hava títt egna handarbeiði við.
Andakt verður lisin hvønn dag.

**Frá Dagtilhaldinum á Strondum**
Vit hava opið týsdag og hósdag millum kl. 15 og 18, vit eru byrjaði aftur.

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
hevur opið mánadag og mikudag frá kl 13 til 17.
Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Eisini eru bløðini til taks.

**Tilhaldið á Toftum, tlf 448690**
Opið er týsdag, mikudag og hósdag kl 15 - 18.
***Týsdagin 2/10***
Vit gera kort
***Mikudagin 3/10***
Filmur
***Hósdagin 4/10***
Boccia og fimleikur